Annika Olsen
Uni Holm Johannesen
Bjarni Kárason Petersen
løgtingslimir

Broytingaruppskot
til
2. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 46/2025 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Flyting av fiskidøgum til árið eftir verður víðkað til eisini at fevna um bólk 5)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1 verður orðað soleiðis:
"Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. mai 2025, verður aftaná stk. 4 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fiskidagar, sum bólkur 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, ikki hevur brúkt í fiskiárinum, tó í mesta lagi 10% av tillutaðu døgunum, kunnu flytast til árið eftir at brúka í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember, herundir treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum."

2. § 2 verður orðað soleiðis:
"Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2027."

Viðmerkingar:

Til nr. 1
Við broytingini verður nýggj áseting sett í § 19, sum hevur til endamáls at geva landsstýrismanninum heimild at flyta óbrúktar fiskidagar hjá bólki 5 til árið eftir. Talan kann í mesta lagi vera um 10% av tillutaðu døgunum árið fyri, sum verða fluttir. Hinir bólkarnir í lógini verða ikki ávirkaðir av hesi broyting.

Til nr. 2
Talan er um sólseturáseting. Løgtingslógin fer úr gildi 1. januar 2027, og tí er heimildin hjá landsstýrismanninum at flyta fiskidagar til árið eftir til bólk 5 avmarkað til tíðarskeiðið, sum lógin er í gildi.

Á Løgtingi, 2. desember 2025

Annika Olsen | Uni Holm Johannesen | Bjarni Kárason Petersen